Tíðindir uttaneftir

Karadziç er sinnaður at lata muslimum landaøki

Skerdu hann og aðrir stjórnarleiðarar í heiminum hernaðarútreiðslurnar við eini helvt og ístaðin brúktu peningin at loysa sosialar trupulleikar, høvdu 10 milliónir menniskjalív verið spard á hvørjum ári

PÓL Á KLETTI

Seinasta týsdag var ein hin blóðugasti dagurin í longri tíð í høvuðsstaði Bosnia-Hercegovina, Sarajevo.

Niggju fólk – teirra millum triggir skúlanæmingar og lærarar teirra – lótu lív og í minsta lagi 70 onnur fólk vórðu særd, tá snikidrápsmenn lupu á. Muslimsku myndugleikarnir vórðu í holt við at flyta burtur 300 borgarar, men máttu gevast.

Teir triggir skúlanæmingarnir og lærarar teirra lótu lív, tá ein spreingiknøttur rakti vestara part av skúlanum, tey vóru í. Spreingiknøtturin soraði fleiri klassarúm og særdi fleiri smærri børn álvarsliga.

Álopini eru tey ringastu

Radovan Karadziç, leiðari hjá bosnisku serbunum, er sinnaður at ganga einum friðaruppskoti frá Týsklandi og Fraklandi á møti og lata muslimum landaøki. USA vrakar uppskotið

eftir at friðartingingarnar, ST og EF fingu í lag millum serbar, kroatar og muslimar, endaðu úrslitaleysar í september.

Karadziç sinnaður at tingast við muslimarnar

Leiðarin hjá bosnisku serbunum, Radovan Karadziç, boðaði týskvøldið frá, at hann, sum lið í eini friðaravtalu, er sinnaður, at lata muslimunum í Bosnia-Hercegovina landaøki.

Sostatt gongur leiðarin hjá bosnisku serbunum einum friðaruppskoti frá Týsklandi og Fraklandi á møti. Londini høvdu hetta uppskot frammi á einum fundi hjá Evropisku Samgonguni í Bruxelles mánadagin.

– Vit eru tilreiðar at tingast við muslimarnar um landaøki – serstakliga í Sarajevo, segði Radovan Karadziç.

Hinvegin vísti ein talsmaður fyri amerikanska uttanríkisráðið hugskotinum aftur. Hann segði, at USA ikki hevur slept ætlanunum um atgerðir móti Bosnia-Hercegovina.

10 milliónir menniskjalív verið spard

Ikki færri enn 29 kriggj vóru í heiminum í 1992. Hetta er tað mesta nakrantíð í einum einstakum ári.

Og hóast ræðuleikar sum teir í fyrrverandi Jugoslavia, minkaðu hernaðarútreiðslurnar fimta árið á rað í heiminum sum heild. Hetta sæst í nýggjastu frágreiðingini hjá World Priorities fyri árið 1992.

Samlaðu hernaðarútreiðslurnar kostaðu í 1992 600 mia. dollarar (4050 mia. kr.). Útreiðslurnar settu met í 1987, tá tær vóru 715 mia. dollarar (4825 mia. kr.).

Orsøkin til minkandi útreiðslurnar er tann stóri niðurskurðurin til hernaðarútgerð í Ruslandi og hinum fyrrverandi sovjetlýðveldunum.

Í World Priorities verður m. a. víst á, at minkaðu allar heimsins stjórnir hernaðarútreiðslurnar við eini helvt og ístaðin brúktu pengarnar at loysa sosialar trupulleikar, vórðu í minsta lagi 10 mió. menniskjalív spard á hvørjum ári.

(RB-REUTER-AFP)



Hóast ikki færri enn 29 kriggj vóru ymsastaðni í heiminum í 1992 - tað mesta nakrantíð - eru útreiðslurnar til hernaðarútgerð í heiminum sum heild minkaðar. Um allar heimsins stjórnir minkaðu hernaðarútreiðslurnar við eini helvt og ístaðin brúktu peningin at loysa sosialar trupulleikar, høvdu 10 milliónir menniskjalív verið spard á hvørjum ári

»The Fugitive« í Føroyum

Havnar Bio hevur frumsýning av filmi í morgin, ið samstundis verður frumsýndur 24 aðrasteðs í danska kongaríkinum. Hetta er fyrsta ferðin at slík »premiera« er í Føroyum. Harrison Ford og Tommy Lee Jones hava høvuðsleiklutirnar í filminum.

DIA MIDJORD

Í morgin skrivar Havnar Bio føroyska biografsøgu. Á listanum frá Warner & Metronome stendur Havnar Bio, sum ein av 25 biografum í danska kongaríkinum, ið fer at frumsýna stórfilmin »The Fugitive«. Harrison Ford og Tommy Lee Jones hava høvuðsleikutirnar í filminum, ið varar 2 tímar og 8 minuttir. Aldursmarkið er 16 ár.

Sjónvarpssendirøð

Filmurin er gjørdur eftir sjónvarpssendirøð, ið var sýnd í seksti árunum. Um læknan, Richard Kimble, ið órættvíst bleiv dømdur sekur í drápinum á konuni. Hann flýggjar og setur sær fyri at finna veruliga drápsmannin. Í sjónvarpssendirøðini varð Richard Kimble í hvørjum parti fylgdur av harðføra og málrættaða politistinum Samuel Gerard, og ikki fyrr enn í seinasta partinum fæst greiða á drápinum.

Andrew Davis hevur nú gjørt ein stórfilm eftir hesi sendirøð (Sami Andrews var eisini instruktør í filminum »Kapring på åbent hav«). Tveir sera góðir filmssjónleikarar hava høvuðsleiklutirnar, og eru teir: Harrison Ford og Tommy Lee Jones. Vit kunnu avdúka, at hesin »action-filmur« byrjar í fimta kervi, men klárar kortini so líðandi at økja ferðina.

Harrison Ford er væl kendur filmssjónleikari í Hollywood og kanska ein hin mest eftirspurdi. Serliga aftaná leiklutirnar í teimum trimum Star Wars-filmunum og teimum trimum væl umtóktu Indiana Jones- filmunum.

Tommy Lee Jones hevur spælt í m.ø. filmunum »JFK« og »Kapring på åbenthav«. Umframt hevur hann leiklutin í komandi Oliver Stone filminum »Heaven and Earth«, ið kemur til Danmark fyrst í komandi ári.

Harrison Ford í leiklutinum sum læknin Richard Kimble

Viðmerkingar til aktuell mál

Hugleiðingar um framtíðar sjúkrahúsverkið

Havi beint nú sitið og fylgt við í sjónvarpinum, orðaskiftið millum Jóannes Eidesgaard, Karl Hera Joensen og Essa Arge.

Tað sýnist sum um Jóannes Eidesgaard hevur fingið fatur á ti rætta endanum. Hann nevndi, at vegna peningatrot er ikki møguligt at lata sjúkrahúsverkið halda fram at virka, sum tað hevur gjørt higartil, broytingar mugu gerast, segði hann.

Eisini hevði hann tó hug at siga Karl Hera ímóti fleiri ferðir, t.d. tá talan var um teir vansar, tað hevur havt og enn hevur fyri sjúkrahúsverkið at hava tey stýrir.

Hann mutaði ímóti, tá Karl Heri ynskti at halda fram við ortopedium á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Jóannes Eidesgaard nevndi eisini, at viðtøkurnar fyri sjúkrahúsverkið máttu broytast, um tær vóru óítíðarhóskandi, sum t.d. tá tað stendur, at serlæknar í kirurgi og medisini skulu vera á øllum trimum sjúkrahúsunum, og at serdeildir annars skulu plaserast eftir hvørjir serlæknar kundu skaffast.

Hesum vísti Karl Heri at hava læst seg fastan í. Tað vísir bert, at Karl Heri hevur sett seg ov lítið inn í tingini.

Jóannes Eidesgaard sýnist at hava fingið eina fatan av, hvat tað snýr seg um. Eisini ørminnist eg, at hann nevndi **kvalitet** í sambandi við viðgerð, og Gud viti um hann ikki eisini nevndi sjúkrarøktina í sambandi við tey smáu sjúkrahúsini, sum annars var heilt burturraderað í rapportini um heilsuverkið (við vilja ella ikki).

Kanska hevur Jóannes Eidesgaard hugsað, at tey smáu sjúkrahúsini skuldu spesialisera seg í sjúkrarøkt, **ein skilagóður tanki**. T.v.s. hava høgt kvalifiseraða sjúkrarøkt at bjóða sjúklingunum, sum eru diagnostiseraðir og lidugt læknaviðgjørdir á Landssjúkrahúsinum, men sum hava heilsu- og sjúkrarøkt fyri neyðini eina tíð frameftir. Tað veri seg bæði medisinskar og skurðviðgjørdar sjúklingar og eisini barsilsrøkt.

Kvalifiserað heilsu- og sjúkrarøkt er millum annað at fáa hjálp til tað, tú ikki sjálvur megnar vegna tína sjúku, hjálp til sjálvhjálp og eisini vegleiðing og undirvísing í sambandi við sjúku og heilsurøkt.

Uppvenjing við hjálp av fysio- og ergoterapeutum kemur eisini uppá tal.

Vælútbúnir kommunulæknar skulu eisini kunna tilkallast, tá tørvur er á læknahjálp. Soleiðis hevði sjúklingurin tá komið í samband við sín egna lækna, og tað kann bert vera positivt.

Endamálið er, at sjúklingurin kemur seg best møguligt og skjótast møguligt eftir sjúkuna ella barnsburðin, og er meira vitandi um ábyrgd fyri egnari heilsu, »eginumsorgan«.

Alt í alt hevði hetta verið betri fyri sjúklingin, høgt kvalifiserað læknahjálp og høgt kvalifiserað sjúkrarøkt, og skjótast møguligt aftur í nærumhvørvinum. Eisini hevði hetta verið bíligari fyri samfelagið. Betri service fyri minni pengar.

Eisini havi eg hug at gera viðmerkingar til ein spurning, sum ofta er havdur á lofti í hesum døgum. Karl Heri nevndi tað eisini: Hvat við tí álvarsliga sjúka, sum er staddur í Klaksvík og hevur fyri neyðini at verða fluttur til Landssjúkrahúsið, tí onki sjúkrahús við serlæknum er í Klaksvík, men ikki kann flytast vegna ódnarveður.

Eg vil svara, hvat við tí álvarsliga sjúka, sum liggur í Fugloy, í Svínoy, ella aðrastaðni í Norðoyggjum og ikki kann flytast til Klaksvíkar sjúkrahús vegna ódnarveður, ella tann sjúki á Sandi, Mykinesi, Skúvoy, sum heldur ikki kann flytast á sjúkrahús vegna ódnarveður?

Heldigvís kemur hetta næstan ikki fyri, tað vita vit av royndum, men vandi er altíð við allari vælferð.

Ein áheitan til Jóannes Eidesgaard og Føroya Løgting. Takið eina avgerð nú, úttrá rapportini sum fyriliggur, og sum eisini líkist øllum hinum rapportunum, sum gjørdar eru. Sjálvt um rapportin ikki er heilt lýtaleys, er nøgv gott og væl gjøgnumtonkt í henni – hon kann brúkast.

Til seinast – hugsið um umboð fyri sjúkrarøktina, tá tit fara at broyta leiðslubygnaðin, tað kann bert vera ein fyrimunur fyri sjúkrahúsini og fyri fólkið alt. Tað er ikki bert av tilvild, at sjúkrarøktin er umboðað í ovastu leiðsluni í øllum londum rundanum okkum.

Gloymið alt um partapolitikk og stemmufiskarí. Latið ikki danskar politikarar enn einaferð diktera okkum, hvat vit skulu gera. Gerið nakað sjálvir, tað er átrokandi neyðugt. Vísið stoltleika.

Margit Hansen.

Perspektivið oljuspurningin!

Føroya søga vísir okkum, at lív forfedra okkara ikki altíð hevur verið ein dansur á rósum. Men teir góvust aldrin á hondum, men funnu altíð gongdar leiðir, sum – hóast mangan sera strævnar – vórðu gingnar, og teirra strev og stríð, teirra hugsjónir, framtakshugur og áhaldandi ágrýtni bygdi landið. Og tøkk fái teir fyri tað. Skaldið Hans A. Djurhuus yrkir í hesum sambandi m.a.:

Tit, sum í fjøru fóru
at skera tara har
og taraleypin bóru
langt inn um hagagarð
Tit, sum við haka gingu
um mýru, oyr og sand
og korn at næla fingu,
tit bygdu hetta land.

Tit, sum við ár í hendi
so mangan ódnardag
á hesum strondum lendu
við høgv og góðum lag,
tit veiddu fisk av grunni
og slitu hungursband
fyri hvønn plink, tit funnu,
tit bygdu hetta land.

Hóast húskallalógir, bátsband, felli, einahandil, korruptar embætismenn, kriggj, depressiónina í 30'unum, vantandi veiðifør og bankakrakk í 50'unum fyri at nevna nøkur dømir, so reistu føroyingurin seg hvørja ferð og gekk framá.

So tá boð eru eftir okkum aftur nú um at bróta upp úr nýggjum, so mugu vit ikki lata vónloysið fáa takið, tí vit eru hóast alt úr sama bergi brotnir, sum teir, ið undan okkum gingu. Lat okkum tí enn einaferð reisa okkum, ganga nýggjar leiðir, so eftirkomarar okkara eisini kunnu siga: »Teir lótu ikki vónloysið ráða, men gingu nýggjar leiðir. Føroya landi og okkum at frama.«

Lat meg í tí sambandi, nú tosið um oljukanningar, møguliga olju og hvussu byrjast skal fyri at rættast kann verða borið at, loyva mær at koma við nøkrum hugskotum.

Føroya løgting eigur at seta pening av á fíggjarlógini oyramerkt til samstarv við áhugað lond, sum í sambandi við rættindir til oljuboringar vilja vera við til at skapa vinnufremjandi tiltøk her heima á landi, og arbeiðsskapandi og lærufremjandi projektir fyri føroyingar uttanlands. Sostatt kann eitt møguligt oljuríkidømi longu nú gerast okkum ein góður trumfur, ja, eitt satt jarnbrot fyri nýskapandi og langtíðarvirkandi loysnum, ið samlaðar kunnu knúsa kreppuna.

Trumfurin eigur ikki at verða goymdur, men eigur at verða spældur út skjótast tilber, ja, longu í innverandi ári. Við hetta meini eg heilt konkret, sum eg eisini førdi fram í Dimmalætting einaferð tíðliga í vár, at vit eiga at seta í verk eitt intensivt og umfatandi samstarv við t.d. Japan. Tá eg nevni Japan, so kemur hetta av, at í einum tílíkum samstarvi dugi eg at síggja óteljandi møguleikar, um rætt verður borið at. Onnur lond kunnu sjálvandi eisini koma upp á tal, men tey fara tvæleyst at melda seg sjálv sum samstarvspartnarar, um vit, í samstarvi við Japan kunnu røkka málum, sum hesi lond halda, at tey áttu at røkt saman við okkum. Og onkustaðni eiga vit at byrja. Tað hjálpir ikki at sita hendur í favn, meðan hin føroyska skútan so líðandi søkkur, meðan fólkið tekur til rýmingar. Okkara skylda er at bjarga skútuni og aftur gera tað lívligt á okkara oyggjum, og til tess nýtist okkum góð hugskot og gamalt føroyskt áræði parað saman við nútíðarloysnum.

Í hesum ljósi eiga fyriliggjandi hugskot at verða tikin fram og mett. Lat meg fyrst taka tey seinastu tølini, eg havi, viðvíkjandi japonskum investeringum og hjálp. Tølini eru fyri árið 1991 og kunnu lesast í Kontakt, ið verður útgivið av Mellemfolkeligt Samvirke, og er nr. 5 frá mars 1993. Á síðu 16 verða nevndar fylgjandi japanskar investeringar í mió. $:

Norðuramerika: 18.823 – Europa: 9.371 – Asia: 5.936 – Latinamr.: 3.337 – Oceanien: 3.278 – Afrika: 748 – Miðeystur: 90. Investeringar íalt: 41.584 mió. $ (Kelda: JETRO, London).

Og tær japonsku hjálparveitingarnar fyri árið 1991 vóru 10.95 milliardir $. Einans USA lá tað árið frammanfyri Japan við 11.50 mia. $. Í 1992 lá Japan á fyrstaplássinum. Eisini síðstnevndu upplýsingar eru úr Kontakt nr. 5 – mars 1993 (Kelda: OSED).

Sostatt kann konstaterast, at Japan er eitt sera kapitalsterkt land, ið ikki heldur seg aftur á heimsmarknaðunum kring allan knøttin. Hartil kemur, at Japan er heimsins størsta fiskivinnutjóð, hevur ein ómetaliga stóran skipasmiðjuídnað og annars ídnað av øllum møguligum slag. Men Japan hevur onga olju. Sjálvandi hava teir ein alstóran oljutørv og ein altumfatandi teknologi, sum sostatt sjálvandi eisini umfatar oljuteknologi. Í hesum sambandi er eyðsæð, at okkara olja, og teirra kapitalur, teirra vantandi olja og okkara vantandi kapitalur, teirra leiklutur, sum heimsins størsta fiskivinnu- og skipasmiðjutjóð, og okkara høvuðsvinna, teirra fjølbroytta ídnaðarvirksemi og teirra heimsumfatandi marknaðararbeiði saman við okkara vantandi ídnað, men sera vælútbúna fólki, er eitt puslispæl, hvar gott fyriverkandi føroyskt planleggingar- og ígongdsetandi arbeiði skjótt og miðvíst í sambandi við japonsku myndugleikarnar, brikk fyri brikk kann leggjast upp á pláss. Sostatt kunnu vit í tættum samstarvi við teir byggja ídnað á landi til tann partin av fólkinum, ið aldrin aftur fær arbeiði innan okkara fiskivinnu. Fyri japanarar, um vit megna at vekja teirra áhuga, eru Føroyar peanuts, tá um loysnir og kapital verður hugsað. Eitt tílíkt samstarv kann geva okkum haldgóðar og varandi loysnir, kann geva øllum vinnuførum hondum arbeiði, geva fólkinum nýggja og neyðuga sjálvsvirðing og okkum sum tjóð møguleika fyri sjálvbjargni. Mentunarliga og málsliga kann hetta bert gerast okkum ein fyrimunur, tí vit kunnu læra aðra mentan og annað mál at kenna, uttan at tað viðførir, at okkara mentan og mál fer at líða undir hesum, tí til tess liggja okkara og japanaranna mál og mentan ov langt frá hvørjum øðrum. Vit eiga tí – sum áður nevnt – at seta sjóðul á samstarvið beinanvegin, og vit vilja fáa at síggja, at tá glið er komið á nevnda samstarv, tá vilja aðrar tjóðir banka á okkara dyr og bjóða seg fram við alternativum loysnum. Í eini tílíkari støðu, verða tað ikki vit, ið koma at standa við hattinum í hondini, men kunnu seta kvalitativ krøv landi og fólki at frama.

Sum ein síðuviðmerking, kann verða víst á, at vit – eins og mong onnur lond – kundu stovnsett tollfríar handlar við alskyns japonskum luksus- og heimleikatólum framleidd í Japan og møguliga eisini í Føroyum upp á licens og undir sakkønari japanskari vegleiðing. Tílíkt kundi verið við til at stimbra ferðavinnuna og harvið eisini verið við til at gjørt land og fólk sjálvbjargið.

Lat meg eisini nevna, at uppruna føroysk hús skulu byggjast í Sovjet eftir donskum initiativi. Hví kunnu føroyskir handverkarar ikki stuðlast í at skapa fyritreytir fyri einari føroyskari loysn á húsatørvi ymsastaðni kring knøttin? Í hesum føri eins í øllum øðrum førum, har vit kunnu bjóða serføroyskt arbeiði fram, eiga marknaðarkanningar at verða gjørdar og vinnan stuðlað. Húsasmið, elektroniskar snellur, Kaldbaksbátar, Esther Fallitúgvan hjá Smith'unum og onnur góð projektir kundu – í sambandi við m.a. japanskan kapital og teirra vælkendu evnir at skapa marknað og sølufremjandi tiltøk – gjørst okkara vegur burtur úr kyksendinum.

Annars haldi eg, at ein hugskotsbanki átti verðið settur á stovn, har allir føroyingar kundu sett teirra hugskot inn til positiva viðgerð. Vónloysi og svartskygni má avloysast av vón og bjartskygni, tí annars verður galin endi. Lat okkum tí heldur í dag enn í morgin byrja at skapa grundarlag fyri vónini. Tí satt er, sum sagt verður: »Vit megna bert vit vilja.«

530 Fuglafjørður,
tann 08.11.93

Dagfinnur Danbjørg.